# Nýtt gólv til steypafinalurnar

**Tá ið steypafinalurnar í flogbólti verða leiktar komandi leygardag, verður leikt á nýggjum gólvi, sum Flogbóltssambandið hevur keypt**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Seinnu árini hevur Flogbóltssamband Føroya á hvørjum ári leigað sær serligt flogbóltsgólv úr Danmark til árligu steypafinalurnar. Nú FBF so keypt gólvið fyri nærum 300.000 krónur.



*Í fjør vóru tað kvinnurnar hjá TB, sum vunnu steypafinaluna móti Drátti. Aftur í ár er TB í finaluni, men hesaferð er mótstøðuliðið Mjølnir, sum fer at royna at koppa TB á nýggja gólvinum hjá flogbóltssambandinum.*

*mynd: Álvur Haraldsen*

### Altjóða viðurkent

Nýggja gólvið, sum Flogbóltssambandið hevur keypt úr Fraklandi, verður eisini nevnt Taraflex-gólv, og hetta er gólv, sum verður nýtt í øllum stórum altjóða kappingum. Gólvið er av merkinum Gerfloor, og tað er altjóða viðurkent.

Tá ið finalurnar verða leiktar leygardagin, verður sjálvur vøllurin appelsinlittur, og alt øki kring vøllin verður grønt. Á henda hátt slepst undan øllum teimum mongu strikum og øðrum, sum er í vanliga hallargólvinum.

Formaðurin í Flogbóltssambandi Føroya, Magnus Tausen, sigur, at FBF hevur í eina tíð arbeitt við ætlanini um at keypa sítt egna gólv, og nú er tað so veruleiki.

– Gólvið hevur roynst sera væl seinastu árini, og høllin hevur tikið seg sera væl út - tað hevur verið sum at koma inn í eina nýggja høll. Ljósið í høllini hevur verið nógv betri enn vanligt, og gólvið hevur tikið seg sera væl út í høllini, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandi Føroya.

Formaðurin leggur afturat, at eisini lýsingarnar kring vøllin koma nógv betur til sín rætt við nýggja gólvinum.

Umframt at nýta nýggja gólvið til árligu steypafinalurnar, so er ætlanin eisini, at gólvið skal nýtast í einum tiltaki fyri yngru deildunum, og harumframt verður eisini arbeitt við at fáa altjóða dystir og kappingar til landið.

# Innandura rógvikapping í Runavík

**Eftir væleydnaðu innandura rógvikappingina í Havn herfyri, hava runavíkingar avgjørt at skipa fyri eini líknandi kapping í apríl mánað**

RÓGVING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Innandura rógving hevur veruliga vunnið seg fram millum føroysk róðrarfólk seinasu tíðina, og ikki minst undirtøkan til kappingina hjá Havnar Róðrarfelag herfyri, har ikki færri enn 83 luttakarar vóru, er eitt gott dømi um vaksandi áhugan.

Nú fara so runavíkingar at skipa fyri eini líknandi kapping, sum vónandi fær eins góða luttøku.

Fyrireikingarnar til kappingina eru farnar í gongd, og væntandi verður kappingin leygardagin tann 2. apríl. Tað vil siga, at hetta er um tað mundi, tá ið bátarnir verða flotaðir, og kappróðrarárið av álvara byrjar.



*Runavíkingar fara nú at skipa fyri innandura rógvikapping, eftir at undirtøkan var so góð, tá ið kappast var í Havn herfyri*

Sum skilst er ætlanin, at innandura rógvikappingin í Runavík verður eitt sindur øðrvísi skipað enn tann í Havn, men enn er ikki greitt, hvør munurin á kappingunum verður.

Eftir øllum at døma verður kappast í Ítróttarhøllini í Runavík.

# Todi og Andrew beinleiðis í sjónvarpi

**Tá ið Todi Jónsson og Andrew av Fløtum bresta saman í fjórðingsfinaluni í donsku steypakappingini, ber til hjá føroyingum, sum hava donsku sjónvarpsrásina TV 3+ at síggja dystin beinleiðis**

SJÓNVARPSDYSTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sunnudagin 6. mars verður fjórðingsfinalan í donsku steypakappingini, tí sonevndu DONG-CUP, millum FC Keypmannahavn og Fremad Amager leikt í Parkini í Keypmannahavn. Gongur tað føroyingum eftir vild, so verður ein føroyskur spælari á hvørjum av liðunum báðum.

Todi Jónsson verður óivað í hópinum hjá FCK, um hann ikki hevur nakran skaða at dragast við, og tað sama kann sigast um Andrew av Fløtum í Fremad Amager.

Tá ið lutakast var um, hvussu spælast skuldi í fjórðingsfinalunum, fall tað soleiðis út, at Fremad Amager fekk heimavøll móti FCK. Men kringumstøðurnar í Sundby Idrætspark, har Fremad Amager hevur heimavøll, eru ikki av teimum bestu, og tí avtalaðu Fremad Amager og FCK í felag, at dysturin skuldi leikast í Parkini, sum er heimavøllurin hjá FC Keypmannahavn.

Dysturin millum Fremad Amager og FCK verður sum áðurnevnt sunnudagin 6. mars, og hann byrjar klokkan hálvgum fimm føroyska tíð, so tá ræður um hjá teimum, ið hava TV 3+, at seta seg framman fyri skíggjan.

# Kendur dómari vitjar

**Síðst í hesum mánaðinum fer kendi hollendski dómarin, Mario van der Ende, at hava skeið fyri føroysku fótbóltsdómarunum**

DÓMARASKEIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vikuskiftið 25. - 27. februar verður sonevnt úrmælingadómaraskeið í Havn. Skeiðið er fyri allar dómarar og linjudómarar í Føroyum, og tað verður kendi hollendski dómarin Mario van der Ende, sum fer at hava størstan partin av skeiðinum.

Mario van der Ende er ein tann kendasti dómarin í evropeiskum toppfótbólti seinnu árini, og hann hevur dømt bæði í EM- og HM-endaspølum, umframt at hann hevur dømt finalur í europeiskum kappingum.

Skeiðið er ein liður í fyrireikingunum til komandi kappingarár hjá teimum føroysku dómarunum, sum eisini fara at hava sín aðalfund í sambandi við skeiðið.

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i